# Bátur til sølu

**Ein Aquastar 33 fót við ella uttan fiskiloyvi til sølu.**
**Báturin hevur alla nautiska útgerð, línuspøl og 5 DNG snellur. Gev eitt boð**



**www.batur.fo**

TEL 333940 · FARTEL 228741

# Frá S & K felagnum

Ársaðalfundur felagsins verður í hølum felagsins á Traðarvegi 20, Tórshavn

**leygardagin 14. februar 2004 kl. 16.00**

Við hesi dagsskrá:

1) Frásøgn formansins frá farna ári
2) Roknskapur til góðkenningar
3) Val av grannskoðara
4) Val av tveimum nevdarlimum og tveimum tiltakslimum
5) Val av formanni
6) Innkomin uppskot
7) Ymist

Uppskot til viðgerðar á aðalfundinum skulu vera felagsnum í hendi 8 dagar áðrenn aðalfundin

**Nevndin**

# Bilur við skaða til sølu!

Fyri P/F Trygd selja vit ein 4-hjólstrektan Toyota Rav 4 við skaða.
Árg.: Januar 2003
Motorur: 2,0 Turbo Diesel
Km.: 27.000

Bilurin verður seldur fyri hægsta boð yvir Kr. 40.000,- sum hann stendur við skaða.



**P/F Reyni Service**
Bilasølan
Tlf. 353040

LANDSVERKFRØÐINGURIN

# Skúrur til sølu

Lítli bíði/toilet skúrurin á Oyrargjógv verður við hesum lýstur til sølu.

Møguligur keypari skal taka skúrin og betong-fundamentið burtur og slætta økið.

Boð skulu verða LV í hendi í seinasta lagi hósdagin 12. februar 2004.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Birgir Johannesen, á tlf. 311333 ella teldupost bj@lv.fo.

**Landsverkfrøðingurin**

SJÓVAR KOMMUNA

# Søkt verður eftir vaskifólki

til dagrøktina og læknahølini á Strondum at byrja 1. mars 2004.

Arbeiðstíðin er 8 tímar um vikuna.

Umsóknir skulu vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 16. feb. 2004.

**Sjóvar kommuna**
490 Strendur

# Kunngerð

## frá útskiftingarnevndini fyri Kunoyar bygd

Útskiftingarfundur verður í Kunoy mikudagin 28. janaur kl. 11.

Á fundinum verða metingin av kommunalu ognartøkuni og endaligur planur fyri útskiftingina løgd fram.

Ætlanin er at enda útskiftingina og lata hana til ákæru.

N. v.
Øssur Á. Midjord,
útskiftingarnevndarformaður

FØROYA PEDAGOG FELAG

# Aðalfundur 2004

Aðalfundurin verður á Hotel Føroyum

**leygardagin 28. febr. 2004 - kl. 15.00**

Skrá:
Smb. viðtøkum felagsins.

Uppskot til aðalfundin skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 7. febr. 2003

**Nevndin í Føroya Pedagogfelag**

# Frá Leirvíkar Arbeiðsmannafelag

Ársaðalfundur Leirvíkar Arbeiðsmannafelag verður 26. februar 2004. Tíð og stað verður kunngjørt seinni.

Dagsskrá sambært lógum felagsins.

Uppskot til ársaðalfundin skal vera nevndarfor-manninum í hendi í seinasta lagi 18. februar 2004.

**Nevndin**

# Frá Arbeiðara-felagnum Hæddini

Eykaaðalfundur verður fríggjadagin 30. januar 2004 kl. 19.00 í felagshølunum.

**Skrá:**
Samanlegging við Arbeiðarafelagið Klettur
Lógarbroyting

**Nevndin**

Sosialurin
-tað loysir seg

# Lastbilar til sølu

Volvo F12, 8 x4 við veirheis og 25 TM krana. Bilurin kann møguliga seljast uttan krana.

Volvo F12, 6x2 við veirheis og dumparalast.

Volvo F10, 6x4 við sterkari last og plássi til krana.

**Á Giljanesi sp/f**
**tlf. 21 98 99**

# Pedagogar til dagstovnin á Oyri

Søkt verður eftir 2 pedagogum til vøggustovuna, at byrja ávíkavist 1. og 8. mars ella eftir nærri avtalu. Støirvini eru 30 tímar um vikuna.

Dagstovnurin er normeraður til 42 børn, sum eru uppdeild í 3 bólkar: Vøggustovan 15 børn 0-3 ár, Innistova 9 børn 3-4 ár og Stóra stova 18 børn 5-7 ár.

Vit liggja í náttúruvinarligum umhvørvi við haga og fjøru og leggja stóran dent á at nýta hetta í gerandisdegnum.
Vit ynskja, at tú saman við okkum kann skapa ein ríkan og mennandi gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum.

Um ongin pedagogur søkir verður hjálparfólk sett fyribils.

Lønar- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum kommunalu arbeiðsgevarafeløgini og Føroya Pedagogfelag.

Umsóknir, við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera stovninum í hendi í seinasta lagi mikudagin 11. februar.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran Rosu Prestá ella varaleiðaran Sólrún Dam á tlf. 422552 ella 227852.

**Dagstovnurin á Oyri**
450 Oyri
tlf. 422552 · fax 422632

# Vestmanna Timburhandil

- søkir eftir fólki til goymsluna -

Í sambandi við vaksandi virksemi verður søkt eftir fólki til goymslu okkara.

**Uppgávur:**
Viðkomandi kemur at hava dagligu leiðsluna av goymsluni, herundir fyriskipan av útkoyring og innkeypi.

**Førleikakrøv:**
Umráðandi er, at viðkomandi dugir at fyriskipa dagliga arbeiðið, er røkin, kennir ábyrgd fyri uppgávunum og er fúsur at taka eitt eyka tak, í einum til tíðir rokmiklum umhvørvi. Tað er ein fyrimunur, um viðkomandi er útbúgvin timburmaður e.l.

**Løn og setanartreytir:**
Talan er um eitt fulltíðarstarv at byrja skjótast tilber. Lønin verður ásett eftir avtalu.

**Nærri upplýsingar um starvið:**
Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Vestmanna Timburhandil, Regin Joensen, telefon 472000.

**Umsóknir:**
Umsóknarfreistin er 15. februar 2004 og skulu umsóknirnar stílast til:

**Vestmanna Timburhandil P/F,**
**FO-350 Vestmanna**

pf VESTMANNA TIMBURHANDIL

*Pf. Vestmanna Timburhandil er stovnaður í 1958, og hevur síðani 1977 selt og framleitt tey vælumtóktu Fjarða-húsini. Fyri teimum árum síðani varð eigaraskifti í felagnum og er virksemi nógv økt hesi seinastu tvey árini. Í dag standa omanfyri 380 Fjarðahús í Føroyum. Umframt at framleiða Fjarðahúsini reka vit timburhandil og byggibúð.*

# Vestmanna Timburhandil

- søkir eftir skrivstovufólki -

Í sambandi við vaksandi virksemi verður søkt eftir fólki til bókhaldið.

**Uppgávur:**
Viðkomandi kemur at hava dagligu ábyrgdina av bókhaldi felagsins, herundir debitor-kreditor- og rakstrarbókhald.

**Førleikakrøv:**
Umráðandi er, at viðkomandi hevur hollar royndir innan bókhald og hevur kunnleika til edv á brúkarastøði. Royndir við bókhaldskipanini Navision er ein fyrimunur.

**Løn og setanartreytir:**
Starvið kann verða hálva ella fulla tíð eftir nærri avtalu. Lønin verður ásett eftir avtalu.

**Nærri upplýsingar um starvið:**
Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Vestmanna Timburhandil, Regin Joensen, tel 472000.

**Umsóknir:**
Umsóknarfreistin er 15. februar 2004 og skulu umsóknirnar stílast til:

**Vestmanna Timburhandil P/F,**
**FO-350 Vestmanna**

pf VESTMANNA TIMBURHANDIL

*Pf. Vestmanna Timburhandil er stovnaður í 1958, og hevur síðani 1977 selt og framleitt tey vælumtóktu Fjarða-húsini. Fyri teimum árum síðani varð eigaraskifti í felagnum og er virksemi nógv økt hesi seinastu tvey árini. Í dag standa omanfyri 380 Fjarðahús í Føroyum. Umframt at framleiða Fjarðahúsini reka vit timburhandil og byggibúð.*

# Pedagogur og hjálparfólk

Søkt verður eftir einum pedagogi at arbeiða 29 tímar um vikuna frá 1. mars 2004. Lønarstig 10/16.

Einum hjálparfólki at arbeiða 29 tímar um vikuna frá 1. mars 2004. Lønarstig 1/5.

Barnagarðurin er ein sjálvsognarstovnur við 2 stovum, 18 børnum í hvørjari, í aldrinum 3-7 ár.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
- Hevur góð samstarvsevnir
- Er røkin, nærlagdur og álítandi
- Nýhugsan og ígongdsetandi
- Dámar væl at vera úti í náttúruni

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meira fæst at vita við at ringja til okkum og tosað við leiðarin Súsanna á Stongum, tlf. 332948.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal verða okkum í hendi seinast 9. februar 2004:

**Barnagarðurin »Sýslan«**
**FO-380 Sørvágur**

# Dagrøktarmamma

Søkt verður eftir dagrøktarmammu, til kommunalu dagrøktina í Hvalbiar kommunu, at byrja 1. mars.

Tað ið krevst er, at tú hevur áhuga og dugir at arbeiða við børnum, dugir at samarbeiða við foreldur, dagrøktarmammurnar og leiðaran.

Húsið skal vera barnavinarligt, innan og uttan og øll í húsinum skulu góðtaka at tú skal arbeiða sum dagrøktarmamma.

Tú verður lønt eftir sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya fyri dagrøktarar. 1/3 av lønini er skattafrí veiting fyri slit av heimi v.m.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Súsannu Poulsen dagrøktarleiðara á tlf. 371339 ella 371085 millum kl. 09 og 16.

Skrivligar umsóknir skulu vera dagrøktini í hendi í seinasta lagi 15. februar. Dagrøktin skilir sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

**Dagrøktin í Tvøroyrar kommunu**

# Skrivari

**Fyri skrivara okkara verður søkt eftir fólki til starvið sum skrivari fyribils í 1 ár, við møguleika fyri framhaldandi starvi í fyritøkuni.**

**Starvið:** Talan er um áhugavert starv sum skrivari fyri stjóran. Harumframt eru fleiri sjálvstøðugar uppgávur at loysa hjá skrivaranum.

**Útbúgving:** Tú skal hava royndir í at arbeiða við teldu og duga at nýta forritini Word og Excel. Ástøðilig útbúgving er góð, men er eingin treyt. Dentur verður lagdur á, at tú hevur áræði, kanst virka sjálvstøðugt og hevur royndir innan skrivstovuyrkið. Góður kunnleiki til mál, og serliga føroyskt, gevur fyrimun.

**Vit bjóða tær:** Góð arbeiðsviðurskifti, góða løn við eftirlønarskipan í samsvari við útbúgving og royndir og góðar møguleikar fyri persónligari menning.

**Umsóknir:** Skrivligar umsóknir skulu sendast til: **P/F Føroya Shell · Postboks 188 110 Tórshavn**, og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 12. februar 2004. Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum kunnu setast Janu Rasmussen, skrivara á telefon 347400.
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Shell